Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

Fólkatingsvalið 2015



# VALSKRÁ

## Vælferð, tryggur búskapur og altjóðagerð



Valdagur 18. juni 2015

Tórshavn 10. juni 2015

# FORORÐ

Góðu føroyingar!

Sambandsflokkurin er einasti flokkur, sum gongur fult inn fyri Ríkisfelagsskapinum, og seinastu nógvu árini hava prógvað, at henda politiska leið er trygg og mennandi fyri tjóðina.

Tað er í einum sterkum Ríkisfelagsskapi og við góðari politiskari leiðslu, at føroyingar hava bestu møguleikar at menna samfelagi og vinnu, og harvið varðveita og menna vælferðarsamfelagið.

Málið er, at fólk skulu trívast í Føroyum, og tað skal verða gott at liva og virka í Føroyum

Sambandsflokkurin vil skapa eitt gott vælferðarsamfelag og nøgdar borgarar

Saman standa vit sterkari

Tað eru vit føroyingar sjálvir, sum eiga at gera neyðugar broytingar í samfelagnum.

Vit skulu royna at skapa framtíðina við m.a. at leggja langtíðarætlanir og framhaldandi vísa á loysnir, sum menna og virðisøkja samfelag okkara - vit skulu øll kunna siga, at her vilja vit búgva og leita aftur til.



*Hetta er tað, sum Sambandsflokkurin arbeiðir fyri á Fólkatingi.*

*Kom við!*

Vinalig heilsan

Kaj Leo Holm Johannesen
Formaður í Sambandsflokkinum

# INNIHALD

**INNGANGUR** .......... **3**
ENDAMÁL .......... 3
VALIÐ HESAFERÐ .......... 3
FOKUSØKI OG MÁLSETNINGAR .......... 4
FRAMD POLITISK AVRIK .......... 4
**RÍKISFELAGSSKAPUR** .......... **6**
**POLITISKA AVBJÓÐINGIN OG BOÐSKAPIR** .......... **8**
**VALEVNI - FÓLKATINGSVALIÐ 2015** .......... **12**

# INNGANGUR

## ENDAMÁL

Ríkisfelagsskapurin skal útviklast – ikki avviklast.

Í valskránni til fólkatingsvalið 2015 hjá Sambandsflokkinum, eru sett upp tey mest týðandi politisku málini, sum eiga at raðfestast høgt í Ríkisfelagsskapinum.

Tíðirnar broytast, og tað gera krøvini til politikk og politikarar eisini. Vit liva í einum samfelag og einari verð, sum er nógv merkt av dynamikki, og tí mugu bæði stevnuskrá og valskrá vísa á tær politisku avbjóðingar, sum standa fyri framman.

Valskráin hjá Sambandsflokkinum setur tí fokus á nøkur serlig øki, sum í verandi støðu og við verandi møguleikum kunnu verða við til at menna Føroyar í Ríkisfelagsskapinum.

Politisku ætlanirnar skulu kunna lata seg gera

## VALIÐ HESAFERÐ

Serliga støðan til valið hesaferð er, at Føroyar hava stóra búskaparliga framgongd og lágt arbeiðsloysi, men enn er hall á fíggjarlógini, umframt at Føroyar hava trupulleikar við búskaparliga haldførinum.

Hetta ber við sær, at tær vælferðartænasturnar, sum vit higartil hava tikið fyri givið eru undir trýsti fyri at verða skerdar.

Búskaparliga støðan í føroyska samfelagnum er rímuliga støðug, men umstøðurnar og fortreytirnar í einum tilfeingisbúskapi kunnu broyttast skjótt hvønn vegin.

Tað er ikki rætt at eksperimentera við lagnuni hjá fólkinum, við t.d. at skerja ríkisveitingina ella at fremja yvirtøkur, heldur ikki í góðum tíðum. At skerja Ríkisveitingina kann gerast ein vanlukka fyri búskaparliga haldførið.

Fólkatingsvalið hesaferð er tí m.a. ein spurningur um at skapa neyðugt støðufesti og tryggleika, og tað gerst best í Ríkisfelagsskapinum.

## FOKUSØKI OG MÁLSETNINGAR

Sambandsflokkurin heldur, at skulu munagóð og ítøkilig úrslit spyrjast burturúr politiska arbeiðinum og við verandi útgangsstøði í búskapinum, er neyðugt at seta politiskt fokus á øki í samfelagnum og Ríkisfelagsskapinum, sum førka landið fram á leið, og sum kunnu skapa bestu búskaparligu úrslitini og geva størst nyttuvirði fyri samfelagið.

Sambandsflokkurin heldur, at størstu politisku avbjóðingarnar fyri Føroyar í Ríkisfelagsskapinum komandi árini, eru innan hesi øki:

- Vælferð
- Tryggur búskapur
- Altjóðagerð

**Fokusøki í Ríkisfelagsskapinum**




## FRAMD POLITISK AVRIK

Sambandsflokkurin kann í hesum og undanfarna valskeiði, vísa á eina røð av politiskum úrslitnum.

Dømi um politisk avrik:

- Prístalsviðger av ríkisveitingini er sett í verk aftur, og inntøkurnar økjast við umleið 200 mió.kr. í 2024
- Fígging til Saltsilo á Drelnesi
- Fígging til Náttúrulundina við Streymin
- Fíggin gtil gransking á Havstovnui (3 ph.d. og 2 postdoc-verkætlanir higartil)
- Atgongd til føroyskar fyritøkur til vinnuframaskipanir í Danmark til íverksetan og innovatiónsverkætlanir, Vækstfonden
- Fólkatingssamtykt um at taka burtur markaforðingar í Ríkisfelagsskapinum

- Ávirka donsku stjórnina í ósemjuni millum Føroyar og ES um makrel- og sildaveiði
- Stórt fokus á at tryggja munagott eftirlit við føroyskum bankum og trygga føroyska uppsparing, um/tá Danmark gerst partur av ES-fíggjareftirliti
- Bankapakkar ásettir til eisini at fevna um Føroyar
- Nýútbúnir føroyingar í Danmark rætt til at taka dimittendpengar við til Føroya, meðan teir søkja sær arbeiði her
- Miðlaavtala í Fólkatinginum áleggur DR at hava størri fokus á Føroyar og Grønland
- Skattafrádráttur (Ríkisfelagsskaps-frádráttur) til føroysk lesandi í Danmark

Sambandsflokkurin á Christiansborg hevur tikið stig til, verið partur av og/ella avgreitt nevndu mál – í summum førum sjálvur, men eisini í góðum samstarvi við einstaklingar, felagsskapir, aðrar flokkar, ríkisstjórnina og landsstýrið.

# RÍKISFELAGSSKAPUR

Sambandsflokkurin er einasti flokkur, sum fult gongur inn fyri Ríkisfelagsskapinum, og sum tí líkist frá hinum flokkunum. Sambandsflokkurin heldur, at bestu samfelagsligu úrslitini verða skapt í tøttum samstarvi í ríkisfelagsskapinum og einum breiðum evropeiskum samstarvi.



Føroyar eiga at verða virknar í samstarvinum við Danmark og Grønland við ítøkiligum tiltøkum og avtalum innan útbúgvingarmál, búskaparmál, heilsumál, almennamál, vinnumál, fiskivinnumál, umhvørvismál, orkumál, tilbúgving, trygd á sjónum o.a.

Sambandsflokkurin setir sum mál at varðveita umboðanina í Fólkatinginum. Við samstarvi kann okkara fólkatingsumboð gera eitt stórt og gott arbeiði fyri Føroyar.

<u>Sambandsflokkurin og Ríkisfelagsskapurin</u>

- Sambandsflokkurin vil, at í felagsmálum (heilsuverk, fólkapensjón og serforsorg) skulu tænastur í Føroyum og Danmark vera á sama støði
- Verja og menna **ríkisborgararættindi**
- Beina burtur **markaforðingar** millum tey trý londini í felagsskapinum
- Styrkja **fíggjarlig- og sosial kor** hjá lesandi føroyingum í Danmark
- Ávirka **uttanríkis-, verju og trygdarpolitikkin**, ið eru felags málsøki í Ríkinum
- Tryggja ein støðugan samfelagsbúskap og varðveita vælferðarstøðið við m.a. **ríkisveitingini**
- Gera meira brúk av **stórrakstrarfyrimunum**, sum Ríkisfelagsskapurin kann hava við sær á fleiri økjum, t.d. sendistovur, integratiónsmál, tvískattaavtalur, vinnulóggáva og verjumál
- Styrkja **samstarvið millum føroyskar og útlendskar skúlar og hægri lærustovnar** fyri at menna og fjøltátta útbúgvingarmøguleikarnar í Føroyum
- **Styrkja rættindi** hjá lesandi, sum velja at útbúgva seg í Danmark og í øðrum londum
- Betri samstarv um **sjúkra- og heilsuviðgerð** (**serviðgerðir**)
- **Felags innkeyp** av heilivági

- Saman við donsku stjórnini at tryggja føroyska samfelagnum og vinnuni nútímans atgongd til **ES-marknaðin**, sum styrkir samfelagsbúskapin og er við til at skapa arbeiðspláss
- Menna møguleikarnar at verða partur av donskum **ígongdsetara- og stuðulskipanum**, sum vinnulívið kann fáa gagn av
- Tætt **samstarv við ríkisins sendistovur** um allan heim, har vinnulívið og lesandi hava møguleika fyri samstarvi og vitan
- Troyta samstarvsmøguleikar í Ríkisfelagsskapinum, eitt nú til nýggjar **mennandi verkætlanir** í Føroyum
- Framhaldandi styrkja **vinnusamstarvið** millum Føroyar, Danmark og Grønland

Sambandsflokkurin vil víðka samstarvið í Ríkisfelagsskapinum, eisini í royndunum at skapa búskaparvøkstur og fólkavøkstur í Føroyum.

<u>Politiskar raðfestingar</u>

Sambandsflokkurin heldur, at eitt tætt samstarv í Ríkisfelagsskapinum hevur við sær, at Føroyar kunnu luttaka effektivt í altjóðagerðini og bæði betri og tryggari skapa framhaldandi menning og vøkstur, umframt tryggja okkara vælferðarsamfelag.

Føroyar eiga eins og onnur minni samfeløg at ásanna tær avmarkingar, sum eitt lítið land hevur og ikki umaftur uppfinna nýggjar kostnaðarmiklar og stórar almennar umsitingarligar skipanir.

# POLITISKA AVBJÓÐINGIN OG BOÐSKAPIR

**Hvat stendur Sambandsflokkurin fyri?**

Sambandsflokkurin er ein demokratiskur, liberalur og sosialt sinnaður flokkur, sum leggur dent á tryggan og støðugan búskap, vinnuligt framfýsni og góðar vælferðartænastur fyri allar borgarar.

Sambandsfloksins hevur til aðalmál í Ríkisfelagsskapi við Danmark at arbeiða fyri frílyntari og hollari menning av føroysku tjóðini, stjórnarliga, fíggjarliga og mentanarliga og vil á øllum økjum reka ein framtaksfúsan politikk á kristiligum mentanarstøði.

Aðalmálið hjá Sambandsflokkinum er at menna føroyska fólkið, soleiðis at tað støðugt verður ført fyri at møta teimum avbjóðingum, sum umheimurin til eina og hvørja tíð setir. Sambandsflokkurin var við til at orða og samtykkja Heimastýrislógina og hann vil innan fyri ríkisfelagsskapin virka fyri at gera tær stjórnarligu broytingar, sum tæna fólkinum best.

Sambandsfloksins hugsan er tann, at skulu vit loysa tær fíggjarligu og mentanarligu uppgávur, sum liggja fyri, og skulu vit til eina og hvørja tíð vera før fyri at tryggja teimum, sum skulu liva í hesum oyggjum eins góð livilíkindi, sum í øðrum framkomnum londum, so er neyðugt at hava tætt tilknýti til annað land.

Søgulig og onnur bond knýta Føroyar og Danmark saman, og royndirnar hava víst, at ríkisfelagsskapurin við hetta land hevur verið føroyska fólkinum til mesta frama.

**Hvat skal veljarin taka støðu til?**

Tað kann verða trupult at gjøgnumskoða, hvat ymsu flokkarnir og valevnini hava at bjóða uppá av politikki til eitt fólkatingsval.

Sambandsflokkurin er greiður og heldur seg til stevnuskrá floksins. Hetta skuldi gjørt tað lættari at tikið støðu á valdegnum.

Sambandsflokkurin heldur, at veljarin skal taka støðu til hesi evni og mál:

- **Útvikling ella avvikling av Ríkisfelagsskapinum**

Hetta snýr seg m.a. um persónligt og fíggjarligt frælsi hjá tí einstaka, t.d. óavmarkaðar møguleikar til ungdómin at velja sær útbúgving og síðan starv, møguleikar at stovna sær fyritøku og selja á einum stórum altjóða marknaði, umframt slíkt sum at tryggja títt persónliga innistandandi í peningastovni.

- **Eins vælferðarstøðið á felags økjum**

Hetta snýr seg um framhaldandi at hækka støðið innan okkara heilsuverk, fólkapensjón og serforsorg, ið Føroyar og Danmark hava felags ábyrgd av og fíggja í felag.

- **Uttanríkispolitisk ávirkan**

Hetta snýr seg um framhaldandi at samstarva á sendistovum Føroya og Ríkisins og um at styrkja handilssátttmálar. Týðandi er eisini á Fólkatingi at hava beinleiðis ávirkan á uttanríkis-, verju- og trygdarpolitikkin Ríkinum.

**Hvørjar eru avbjóðingarnar og fokusøkini?**

Føroyska samfelagið hevur í løtuni politiskar, búskaparligar og vinnuligar avbjóðingar at vinna á. Hallið á fíggjarlógini skal burtur og Føroyar skulu niðurgjalda skuld við tí endamáli at tryggja búskaparliga haldførið og framtíðar vælferð.

Tað at Føroyar eru í Ríkisfelagsskapi hevur m.a. við sær, at Føroyar standa sterkari viðvíkjandi framtíðar haldføri í føroyska búskapinum, umframt at altjóða kredittmetingar av landskassanum gerast munandi betri.

Sambandsflokkurin setir tí fokus á hesi øki í Ríkisfelagsskapinum:

| *Fokusøki* |
| --- |
| • **Vælferð**<br>• **Tryggur búskapur**<br>• **Altjóðagerð** |

**Hvat fær veljarin afturfyri - vallyftini?**

Sambandsflokkurin ætlar í Ríkisfelagsskapinum at virka fyri einum konstruktivum politikki, sum fer at fáa positivar avleiðingar fyri einstaka borgaran, føroyska samfelagið og vinnuna.

*Vælferð*

Sosialar tænastur

Sambandsflokkurin vil, at í felagsmálum (heilsuverk, fólkapensjónir og serforsorg) skulu tænastur í Føroyum og Danmark vera á sama støði



Heilsupolitikkur

- Styrkja serviðgerðir uttanlands og arbeiða fram ímóti, at Føroyar og Danmark skipa felags innkeyp av heilvági, sum gevur lægri prísir

Útbúgvingarpolitikkur

- Framhaldandi styrkja rættindini hjá lesandi



Mentanarpolitikkur

- Arbeiða fyri fígging til føroyskar verkætlanir, t.d. innan mentan og gransking



*Tryggur búskapur*



- Dagføra ríkisveitingina, ið er tryggasta inntøkan til fígging av okkara vælferð
- Ríkisfelagsskapurin gevur okkum betri búskaparligt haldføri, hægri altjóða kredittmeting og harvið lægri rentu á lánum
- Støðugur búskapur, tryggleiki og trivnaður skapar fólkavøkstur

*Altjóðagerð*

- Tryggja føroyska samfelagnum og vinnuni nútímans atgongd til ES-marknaðin, ið vil skapa arbeiðspláss og styrkja búskapin
- Okkara umboð á Christiansborg vil brúka sína ávirkan at útvikla og ikki avvikla Ríkisfelagsskapin



*Politisk frával*

Sambandsflokkurin fer politiskt ikki at virka fyri hesum:

- Ríkisveitingin eigur ikki verða skerd
- Yvirtøkur verða ikki framdar, sum kosta vælferð ella elva til ótryggleika, t.d. fíggjarøkið, herundir fíggjareftirlit og innskjótaratrygd

*Sambandsflokkurin fer til fólkatingsvalið uppá at gerast ein vinnari og fáa eitt umboð í Fólkatingið*

# VALEVNI - fólkatingsvalið 2015



1. Kaj Leo Holm Johannesen, Tórshavn



2. Bárður S. Nielsen, Vestmanna



3. Edmund Joensen, Oyrarbakki



4. Johan Dahl, Fámjin



5. Bjørn Kalsø, Syðradalur K.



6. Helgi Abrahamsen, Strendur



7. Alfred Olsen, Saltnes



8. Edva Jacobsen, Fuglafjørður


9. Rósa Samuelsen, Sandavágur


10. Reimund Langgaard, Leirvík


11. Eivin H. Jacobsen, Sørvágur


12. Gerhard Lognberg, Skopun


13. Niels Olaf Eyvindsson, Sandvík


14. Conrad Gaard Joensen, Vágur